


***Nr. 17*** ***20. august 2017*** ***77. árg.***

# Reis teg upp

*So vilja vit ikki víkja tær frá, tú okkum varði, so vilja á navn*
*títt vit kalla! Harri, herskaranna Gud, reis okkum aftur*
*á føtur, lat lýsa ásjón tína, at vit mega bjargað verða!*
*Sálmur 80,19–20.*

Vit eru soleiðis uppald, at um vit skulu uppnáa okkurt, mugu vit fyrst avrika nakað. Tú hevur eydnu tína í hondum tínum, og lívið verður tað, sum tú sjálvur ger tað til. Alt byrjar við okkum sjálvum. Sjálvandi er okkurt í hesum, og kortini minni enn vit mangan vildu havt. Tað er ein røð av viðurskiftum, bæði í fortíð og nútíð, sum eru við til at avgera, hvussu lív okkara fer at laga seg.

Í viðurskiftunum við Gud er tankagongdin, ið hvussu so er, heilt øðrvísi. Her er upprunastøðið eitt annað. Her byrjar tað ikki við okkum, men við Gudi. Viðurskifti okkara við hann byrja ikki við, at vit venda okkum til hansara, men við at hann vendir sær til okkara. Hann gevur okkum møguleika at hava við seg at gera. Tað er hann, sum gevur okkum lívið og framvegis heldur tí uppi.

Orsaka av gávu hansara til okkara kunnu vit venda okkum til hansara og ákalla hann. Vit kunnu biðja hann um at reisa okkum aftur á føtur, um vit falla, ella hava ilt við at fáa greiði á tilveru okkara. Orsaka av náði hansara kunnu vit eisini biðja hann um at lata andlit sítt lýsa yvir okkum, sum vit hoyra tað í aronitisku signingini undir gudstænastuni. Tað merkir, at hann gevur okkum frelsu og ævigt lív.

*Jesus, mín trúfasti Harri og kongur,*
*øllum, tú vanst mær, eg taki ímót!*
*Ei vil eg tærast av ivanum longur;*
*tú hevur lovað at leiða mín fót.*

# Endamálið við Bíbliuni

*Tí at so elskaði Gud heimin, at hann gav son sín, hin einborna, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív.*

*Jóh.3,16.*

Bíblian talar týðiliga um alt, sum viðvíkur okkara sælusøk. Enntá hin fákunni skal ikki villast, um hann gevur gætur eftir orðsins ljósi. Bíblian er skrivað, fyri at vit skulu trúgva og ikki ivast. Soleiðis talar orðið fastliga og greidliga um Guds kærleika. Vit skilja ikki, at hin heilagi og almáttugi Gud kann elska syndarar. Men Skriftin sigur, at hann ger tað og sigur eisini, hvussu hesin kærleikin er:

„Tí at so elskaði Gud heimin, at hann gav son sín hin einborna, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, skal ikki glatast, men hava ævigt lív. Tí at ikki sendi Gud sonin í heimin, til tess at hann skal døma heimin, men til tess at heimurin skal verða frelstur við honum."

Kann tað verða sagt týðiligari! Tí at so elskaði Gud, at hann gav, at hann frelsti okkum frá hini ævigu glatan, frelsti okkum til hitt æviga lívið. Tí at Gud elskar okkum so hátt, at hann, fyri at hann ikki skuldi koma at døma okkum, sendi okkum son sín at frelsa okkum. So góður er Gud!

Sí, hvussu stóran kærleika faðirin hevur sýnt okkum, at vit kunnu verða kallað Guds børn – og vit eru tað! Halleluja! Her er hitt óvikandi prógvið fyri Guds kærleika til syndarar.

Nýtist okkum meira?

*t.* týddi.

---

Um tú nakrantíð kemur í eina støðu, har tú hvørki veitst út ella inn, rópa so á Jesus!!!

*e. c.* ums.

# At søkja Guds nærveru

Ein vitnisburður frá einum trúgvandi við muslimskum grundarlagi:

Eg varð føddur inn í eina muslimska familju. Summi í familjuni trúðu einki og vóru verðsliggjørd, og onnur vóru religiøs. Pápi, sum var sufistur, var ógvuliga religiøsur, og hann hevði stóra ávirkan á lív mítt. Tá ið eg var 10 ára gamal, byrjaði eg at søkja Gud. Eg var so ágrýtin eftir at søkja nærveru hansara og gjørdi alt, sum eg kundi, at koma tættari inn at honum.

Sum ungur helt eg fram við at søkja, og eg var uppaftur ágrýtnari at biðja, fasta og fara í moskuna. Eg bað ikki bara tær vanligu bønirnar, eg kallaði eisini á Gud av øllum mínum hjarta. Hesi árini, har eg søkti eftir Gudi í islam, endaðu við, at tað rann upp fyri mær, at Gud var ikki komin mær nærri – í roynd og veru tóktist tað, sum Hann var ógvuliga langt frá mær. Tá ið eg kom í tann aldurin, at eg skuldi inn á lærda háskúlan, var eg givin at leita eftir Gudi.

Eitt kvøldið, meðan eg gekk saman við nøkrum vinum, hoyrdi eg evangeliið fyri fyrstu ferð. Ein endurføddur kristin, sum ein felags vinur hevði presenterað fyri mær, vitnaði fyri mær og lutaði opið boðskapin um Jesus við mær á gøtuni í Kairo. Vikuna eftir fór eg í kirkju við honum – og bara fýra vikur seinni tók eg ímóti Jesusi sum mínum persónliga Frelsara! Eg upplivdi júst tað, sum hesin ungi trúgvandi hevði greitt mær frá tí: „Kom sjálvur og síggj – Jesus livir, Hann grøðir og setir fólk í frælsi.“

Tað kvøldið bað eg fyri fyrstu ferð. Eg spurdi Hann: „Hvar er vegurin? Er Kristus vegurin til Guds?“ Svarið var „Ja“. Eg segði í hjarta mínum, „OK“, og upplivdi í somu stund Guds nærveru – ein himmalskan frið og gleði. Eg bleiv kristin, tá ið eg segði OK við Jesus!

Nakað eftir hetta eltu og søktu mín familja og bygdarfólkið at mær av tí allar grovasta, men nærvera Hansara var so sterk innan í mær, at líka legði eg í tey tap og tann vanda, sum fylgir við, tá ið tú gerst ein Jesu lærusveinur.

„30 dage i bøn for den muslimske verden“
*Effie Campbell* umsetti.

# Sjúka í sálini

Óteljandi milliardir av krónum verða á hvørjum ári nýttar til heilsurøkt, sjúkrahús og heilivág. Tað allarmesta fer til at grøða sjúkur í kroppinum og skaðar á armar og bein.

Vísmaðurin í forntíðini, Marcus Tullius Cicero, skrivaði, at „sjúka í sálini er meiri oyðileggjandi enn sjúka í kroppinum." Hvat eru sjúkur í sálini? Tað man serliga snúgva seg um stúranir og mótloysi, misunnilsi og vanvirðing, hatur, svik og nógv annað, sum Bíblian rópar synd.

Gud kann grøða sár og skaða í sál og sinni. Hann kann fyrigeva og broyta hugsanir okkara. Um Jesus sigur Bíblian: *„Hann varð særdur vára synda vegna og sundurbrotin vára misgerða vegna; okkum til friðar kom revsingin niður á hann, og av sárum várum fingu vit heilsubót.*" (Jes.53,5).

---

# Jesus
## – Guds offurlamb

Einaferð var eingin synd, óndskapur, einki hatur, kríggj og ongar sjúkur á jørð. Alt var friður og semja. Men ein dagin smeyg slangan – hin óndi djevulin – sær inn í Edens urtagarð. Tá vendi menniskjuni sær burtur frá Gudi og fylgdu djevlinum, tá komu synd, sorg, sjúka og hatur inn í verðina. Men Gud elskaði verðina og vildi frelsa verðina og gera bót fyri menniskjuni, sum høvdu syndað. Tá sendi hann Jesus, sum gjørdist Guds offurlamb. Gud sendi ikki eina bók, eina religión, eitt ritual, tá ið hann skuldi frelsa verðina. Hann sendi ein mann – ein persón, Jesus, Guds son, sum gjørdist okkara staðgongumaður og tók á seg allar okkara syndir, sjúkur og revsing – so at vit sleppa undan. Av tí at hann tók okkara syndir, kunnu vit verða grødd.

*e.c.* ums.

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Repro– & prent:** Prenta, 35 77 74




*Nr. 18* *3. september 2017* *77. árg.*

# Hevur tað skund?

*Tá latum okkum vara okkum væl fyri tí, at nakar av tykkum skal halda, at hann er dragnaður afturúr.*
*Hebr.4,1.*

Hevur tað slíkan skund? Gev tær stundir! Skjótt er skitið verk. Tú manst fara at náa tað, um tað er okkurt, sum tú skalt náa. Spar tær kreftirnar. Tú slítur hjartað upp av øllum hasum spenninginum og ófriðinum.... Soleiðis ljóða leiðbeiningarnar frá tí ónda lokkaranum. Hann hevur eisini eina aðra áminning. Hon ljóðar: Skunda tær! Tú nært tað ikki! Tínir møguleikar eru spiltir, og manst tú ikki hava syndað móti Heilaga Andanum? Man Gud ikki vera vorðin troyttur av tær? Tú mást í minsta lagi kýta teg, um tú skalt gera tær nakrar vónir um at náa málinum.

Hann hevði ikki verið tann vandamikli svikarin, sum hann er, um hann ikki dugdi at snara sannleikanum. Hann er meistari í at nýta Guds orð á ein slíkan hátt, at tað verður fals. – Tað er satt, at tað hevur skund. Tíðin er dýrabar, og tað er vandamikið at útseta. Mong vórðu fløkt inn í tað stóra svikið, tí tey blivu við at siga: Ikki enn, ikki enn!.... Tað er eisini rætt, at tað hevur ongan skund hjá tí, sum trýr. Sáðið búnast ikki í einum handarbragdi. Fyrst strá, so aks, so fult korn í aksinum. Gev tær stundir! Alt veldst um Gud, sum gevur vøkstur. Er tað ikki ein mótsøgn? Jú, hetta er júst so mótsigandi, sum lívið er. Báðir partar skulu sigast. Júst á sama hátt sum Paulus skrivar í Fil. 2,12–13: „Arbeiðið upp á tykkara egnu frelsu við ótta og bivan; tí at tað er Gud, sum virkar í tykkum bæði at vilja og

at virka.“ Tað hevur skund!... í dag er náðitíðin. Í dag mást tú ogna tær Guds náðiorð. Um morgindagin veitst tú onki.... Lat alt byggja á Gud og hvíl í tí. Lat Gud eiga allan teg í hesi løtu og allar løtur!

# Still fyri Harranum

*Bíða í kvirri, sál mín ,Gudi, frelsa mín kemur frá honum.*
*Sálmur 62,2.*

Alt ov ofta geva vit okkum ikki stundir at gerast still fyri andliti Harrans. Vit eru so skundmikil og ótolin og halda mangan, at vit hava ikki stundir at dvølja so leingi í loynikamarinum. Og tá ið vit fara inn í loynikamarið, er tað viðhvørt, eins og hjartað hveppist í ófriði, sálin er sum ringur sjógvur, og tað er ógjørligt at hava bindindi at savna sinni og hugsan í stillari bøn. Men tá skulu vit minnast orðini, sum profeturin segði við ísraelmenn, tá ið teir ráðaleysir og friðleysir fóru higar og hagar: „Tí at so sigur Harrin, drottin, Ísraels heilagi: Við at venda við og vera kvirr skulu tit verða frelst; í tolinmóði og troysti skal styrki tykkara vera.“ (Jes.30,15).

Tað er ikki at fáa avrikað so nógv sum møguligt; men tað ræður fyrst og fremst um at lýða á Gud fyri at hoyra, hvør vilji hansara er. Vit mugu, sum sálmaskaldið sigur við sál okkara: „Bíða í kvirri, sál mín, Gudi, frelsa mín kemur frá honum. (Sálmur 62,2).

Í kvirruni talar Gud, í kvirruni vaksa vit Guds vøkstur, í kvirruni veksur styrki okkara.

Harri, ger sál mína kvirra, legg tín djúpa frið í sál og sinn! Harri, ger kvirt í huga míni, so hann bara rúmar tær og tínum! Verið kvirr fyri Gudi eina!

*t.* týddi.

---

Eg vil minna teg á, at Gud er ein familju–Gud. Hann førdi jødarnar út úr Egyptalandi familju eftir familju eftir familju. Í Nýggja Testamenti sigur Gud, at tá ið tú trýrt á Jesus, skulu tú og hús títt verða frelst (Áps. 16,31). Hús títt er tað sama sum tín familja. So miss ikki mótið, halt á og bið.

*e.c.* ums.

# Hetta mátti eg gjalda

Vit gruna ikki hvussu nógv, ið Jesus mátti líða, fyri at keypa okkum frelsuna. Vit ána ikki, hvussu dýr hon var í veruleikanum.

Ein gomul kona plagar at lurta eftir telefonandaktini hjá Indre Mission. Ein dagin var tað ein skúlatænari, sum æt Christen Madsen, sum helt andaktina. Hann var úr Fredericia og var so ógvuliga eyðmjúkur. Henda andaktin hevði stóra ávirkan á hesa gomlu konuna, og hon segði mær frá innihaldinum. Christen Madsen, sum var ómetaliga rørdur, meðan hann talaði, greiddi soleiðis frá:

Eg sá einaferð eina sjón. Eg sá ein naknan mann upp á langan avstand. Eg helt, at hetta mundi vera ein víkingur ella ein sinnisbrekaður maður. Spakuliga kom hann gangandi ímóti mær. Tá ið hann nærkaðist, sá eg, at hann var fullur í sárum um allan kroppin. Hendur og føtur vóru gjøgnumstungin og síða hansara við. Hann rætti hond sína út móti mær. Í fyrstani hugsaði eg, at tað var ein steinur í henni, sum hann mundi hava tikið upp á eyrvegnum. Men so sá eg, at tað var ein gimsteinur, sum glitraði og glampaði. Hesin glansurin spegladist aftur úr eygunum á manninum. Brádliga sá eg, at navn mítt stóð skrivað á steininum: Christen Madsen.

Eg visti, at hetta var Jesus. „Hetta mátti eg gjalda fyri at bjarga tær," segði hann.

Eg legði meg á knæ at tilbiðja mín Harra og Frelsara, og síðani tann dagin havi eg fylgst við honum.

*Effie Campbell.*

---

Jesus spyr ikki, hvørji vit eru, ella hvat ið vit eru. Hann sigur bara: „Komið!" Alt tað, sum liggur aftan fyri bak, vil hann fyrigeva okkum, tá ið vit játta tað, og síðst, men ikki minst er tað gott at vita, at Jesus gloymir alt, tá ið tað er fyrigivið. Tað er bara Jesus, sum kann geva einum persóni ein heilt nýggjan møguleika, eitt heilt nýtt lív!

*e.c.* ums.

# Kærleikin er tolin

Ein mamma sat við seks ára gamla soni sínum í bíðirúminum hjá læknanum. Meðan tey bíðaðu, fór hann at spyrja um alt møguligt. Eftir einum hálvum tíma kláraði hann at koma ígjøgnum flestu av gátunum, sum menniskjan stríðist við. Øll, sum sótu har, undraðust á tolið hjá mammuni, tí hon svaraði øllum spurningunum grundiga og tolin. Sjálvandi tók hann eisini fram evnið Gud. Meðan hini í bíðirúminum lurtaðu eftir hansara endaleysu „hví“ og „hvussu,“ kundi tú næstan lesa í andlitum teirra: „Hvussu klárar hon at halda hetta út?“ Men tá ið hon svaraði næsta spurninginum hjá soninum, svaraði hon eisini teirra. „Hví?“ spurdi hann, „verður Gud ikki viðhvørt troyttur og gevst bara?“ Eftir at hava hugsað seg um eina løtu, svaraði hon: „Tí Gud er kærleiki, og kærleikin møðist ikki.“

Sama sigur Bíblian: *„Náðigur er Harrin og miskunnsamur, tolin og ríkur av góðsku.“* (Sálmur 145,8).

---

Fornfrøðingar hava fyri stuttum staðfest, at essenarar, sum annars hildu til í Qumran við Deyðahavið, eisini búðu uppi á Zions fjalli. Essenarar vóru eitt manssamfelag, nakað sum ein kleysturskipan. Tí var tað, at Jesus bað lærusveinar sínar hyggja eftir nøkrum so ótrúligum, sum „einum manni, ið ber eina krukku av vatni” (Mark. 14,12–17) og fylgja honum og finna salin, har teir skuldu hava kvøldmáltíð. Hesin salur er annars hin sami sum tann loftsstovan lærusveinarnir vóru samankomnir fyrstu hvítusunnuna.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Repro– & prent:** Prenta, 35 77 74